# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ein múrari fyllir seksti



Í gjár fylti oyndfirðingurin Hildebjartur Antoniussen 60 ár. Eg legði merki til tað heilt av tilvild í Sosialunum, og vil fegin ynska mínum góða vinmanni hjartaliga tillukku við degnum.

Hildebjartur er 12 ár eldri enn eg, og tað merkir, at hann var longu farin av bygdini, tá ið eg var smádrongur, so eg lærdi hann ikki at kenna, fyrr hann aftur kom at vitja heimbygdina, og tað gjørdi hann trúliga og búsettist eisini aftur okkurt skifti.

Tað var so undarligt í mongum húsum í Oyndarfirði. Fyrst eg kann minnast var ljós í teimum, og so sløknaði knappliga og tendraði ikki aftur. Deyðin hevði verið á vitjan. Soleiðis var eisini hjá foreldrum Hildibjarta. Barnaheimið hjá honum lá beint á leiðini niðan og oman frá okkum, og fyrst eg kann minnast, var altíð ljós har um kvøldarnar.

Børnini hjá Esbern og Ragnhild fóru øll av bygdini so skjótt tey komu til, og síðan doyði Ragnhild. Esbern var einsamallur, so doyði hann, og nú var húsið myrkt. Tað sløknaði í so nógvum húsum, av teimum 32 húsunum heimanfyri ánna, sum ljós var í, tá ið eg var smádrongur, er øskukalt í 14 av teimum í dag.

Hildebjartur var farin at læra til múrara, og nú sást hann í bygdini at gera okkurt arbeiði. Beiggin Kaj, gekk honum til handa, tá ið okkara hús vóru spekkaði, og tað hevur so verið einastaðni miðskeiðis í sjeytiárunum. Kaj lærdi til tannlækna tá, og hetta var soleiðis partvíst á starvsleiðini hjá Kaj, at Hildebjartur fyrst legði honum lag á og lærdi hann at fylla størri høl í betongvegginum, áðrenn hann fór at fáast við smáputlið, at plombera tenn. Nakað hava múrarar og tannlæknar til felags, og Hildebjartur hevur verið Kaj Sonna góður lærumeistari.

Maður roknar vanliga lívið í tveir partar. Fyrri partur er áðrenn hann møtti konuni, og seinni partur er konan. Eg lærdi Hildibjart at kenna, áðrenn hann møtti Sonnu, áðrenn hann fekk tungu skyldurnar sum forsyrgjari, maður og pápi. Vit høvdu tað stuttligt mangan í vertskapi, bæði i Oyndarfirði og í Havn. Onkur geneverkrukkan varð tømd og glarfitisbóndin í Funningi, Petur Skeel Skarðsá hjálpti munandi til við humøri og góðum huglagi. Nú er eisini alt hetta søga, men sama góða lagið er, tá vit tríggir hittast, og ofta verður rikið aftur á hesar føgru og sorgleysu nætur, áðrenn Hildebjartur møtti konuni, tá ið alt var leikur og gaman, og lívið enn ikki var farið at merkja okkum nevnivert. So kom Sanna upp í leikin og vertskapurin steðgaði, aðrar lívsjáttandi skyldur hvíldu á okkara góða og glaða vinmanni. Nú var hann pápi og maður. Amor skeyt eisini ørvar í meg og Petur Skeel, tó í Petur nakað væl seinni, hann dugdi betur at snúgva sær millum ørvsoddarnar, sum tann kimligi seyðamaður hann her.

Góðir vinir nýtast ikki at hanga um hálsin á hvørjum øðrum dagliga. Vit báðir, Hildebjartur hittast av og á, og beinanvegin er góða hugnaliga lagið aftur okkara millum. Seinnu árini havi eg fyri tað mesta hitt hann á Landskjalasavninum. Hann er íðin ættargranskari, og neyvan nakar oyndfirðingur kennir so nógvar deyðar oyndfirðingar sum júst Hildebjartur, kanska Freydis gevur honum kapping. Hildebjartur fer so langt aftur sum kirkjubøkurnar loyva, og hann fer enn longur aftur í øðrum skjølum. Hann kennir mínar forfedrar betri enn nakar. Allar hesa menn og kvinnur, hvørs genir liva í okkum báðum og hann hittir funningsmenn seint í miðøld, sum eisini høvdu skil fyri glarfiti.

Og nú vit tosa um glarfiti, so er fletting í hond, og komi eg ikki í føðingardag í kvøld, so er tað tí at eg tummi og geri lekrar tálgasperlar norðuri í Oyndarfirði, sperlar sum smelta á tunguni, tá ið teir hava tikið við salti og sum eru lívshættisligir fyri blóðrenslið, men sum smakka so væl, at tú gloymir allan deyðsangist og framskundaðan ævinleika, meðan teir lættliga glíða niður á nýbakaðum heimabakaðum breyði, tey frá mammu.

Hjartaliga tillukku góði vinur, ein heilsan til Sannu, og alt tað besta fyri teg og tína familju.

**Vinarliga**
**Jústinus Leivsson Eidesgaard**



Tórshavnar alfrøði:

Mynd: Fornminnissavnið

## Konfirmantar í 1934

*Hesir vóru konfirmantarnir um heysti 1934: Johanne Nielsen (Havn), Susanne Marie Joensen (Nólsoy), Oline Marie Fanny Niclasen (Velbastað), Elin Marianna Brynhild Patursson (Kirkjubø), Sigga Maria Danielsen (Velbastaður), Agnes Jovine Danielsen (Havn), Hanna Udbø (Havn), Paula Olivia Danielsen (Nólsoy), Susanne Kragesten (Havn), Dina Ingerda Petersen (?), Anna Elisabeth Ziska (Havn), Hanna Sofie Jacobsen (Havn), Anna Eline Joensen (Argir) Else Vilhelmsen (Havn), Jacobine Susanne Mortensen (Argir), Maren Sofie Jordea Hansine Thomasen (Havn), Magnus Madsen (Havn), Jacob Anton Octavius Petersen (Rituvík), Jørgen Borgsteen Ludvigsen (Havn), Øssur Patursson (Kirkjubø), Torstein Mortensen (Havn), Arne á Rógvi Nielsen (Havn), Jacob Henrik Lützen (Havn), Hans Marius Kamban (Havn), Joen Jacobsen (Nólsoy), Simon Peter Joensen (?), Thomas Jul Joensen (Nólsoy), Robert Debes Fridtjof Arge (Havn), Poul Reinert Ferdinand Joensen (Havn), Hans Andreas Jacobsen (Nólsoy), Erling Samuel Hammershaimb Christiansen (Havn), Niels Jacob Madsen (Havn) og Jens Wenningsted Tórgarð (Havn).*

33 konfirmantar vóru til hesa konfirmatiónina, men bert 10 hava verið hjá fotografi. Drongurin uttast t.h. sigst vera Thomas Jul Joensen (Nólsoy). Heitt verður á lesarar, sum kenna fólk á myndini um at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647.

## Andlát og jarðarferðir

**Lena Johannesen, Oyndarfjørður**, andaðist í heiminum 10. oktober, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Oyndafjarðar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Lenu kunnu lata Oyndafjarðar kirkju eina gávu.

Kistan við **Daniu Luid**, fer av Lágargarði í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Daniu kunnu lata eina peningagávu til Alzheimersfelagið. Konto í peningastovnunum.

**Jákup Pauli Sundsskarð, Klaksvík**, andaðist í heiminum mikudagin 12. oktober, 57 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Poul Hammer úr Hovi** andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 10. oktober, 66 ára gamal. Bønarhald var í kapellinum hósdagin 13. oktober klokkan 17. Gravarferðin verður úr Hovs kirkju fríggjadagin 14. oktober klokkan 13. Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans kunnu í staðin lata eina peningagávu til Missiónshúsið í Hovi.

**Edit Joensen, Klaksvík**, andaðist á Norðoya Røktarheimi týsdagin 11. oktober, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Dania Luid, ættað úr Hovi**, búsitandi í Havn andaðist á Lágargarði 10. oktober, 80 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Jógvan Julius Joensen, ættaður úr Fuglafirði**, búsitandi í Gilleleje, andaðist sunnudagin, 95 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13 úr kirkjuni Bygade 26, Søborg, 3250 Gilleleje.

## Prentsmiðja keypir reklamuvirki



*Gunnvá við Keldu, stjóri á Vasti og Kristoffur Laksá, stjóri á Estra eiga nú Estra saman við Sonju á Líðarenda - og Estra eigur Vasti*

**Prentsmiðjan Estra í Gøtu hevur í dag keypt allan partapeningin í reklamuvirkinum Vasti í Klaksvík. Samstundis hevur eigarin í Vasti, Gunvá við Keldu, keypt seg inn í Estra**

VINNA

– Ætlanin við umskipanini er at styrkja báðar fyritøkurnar, nú kappingin gerst alsamt harðari. Estra og Vasti hava samstarvað væl seinastu árini, og hildið verður, at hetta stigið fer at gera fyritøkurnar førar fyri at geva kundunum eina meira dygga og fjølbroytta tænastu, sigur Kristoffur Laksá, stjóri á Estra.

Gunvá við Keldu heldur fram sum stjóri í Sp/F Vasti, ið framhaldandi verður rikið sum eitt sjálvstøðugt virki.

Við avtaluni eru nú tríggir eins stórir eigarar í Estra. Teir eru Gunvá við Keldu, Sonja á Líðarenda og Kristoffur Laksá.

### Dagurin

**14. oktober. Kalixtus**, deyður umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum teirra kristnu.
Summar av katakombunum bera navn hansara.
Veturnætur, vetrarhálvár byrjar.